

# ALEXANDUR SKORAR TÝÐINGAR

**EIN GÓÐ TÝÐING ER SUM EITT FLOTT SKORAÐ MÁL, SIGUR TÝÐARIN ALEXANDUR KRISTIANSEN, SUM EISINI TRÝR UPPÁ, AT TAÐ MESTA KANN SIGAST NÓGV FLOTTARI Á FØROYSKUM ENN Á ØÐRUM MÁLUM**



PORTRETT

Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Hann setur peikifingurin í borðplátuna og fluktar hann skjótt á skák frameftir

– Bam! Sum eitt perfekt skorað mál í fóltbólti. Soleiðis kennist tað, tá ein týðing situr, sum hon skal.

Eina løtu sær 60 ára gamli týðarin og yrkjarin Alexandur Kristiansen heilt væl nøgdur út við sína takkling á borðinum. Tað ræður um at njóta ímyndaðu skoringina

– Sumt hendir bara eina einastu ferð. Tað ber jú ikki til at endurskapa løtuna, sum fekk bóltin ella týðingina at sita júst soleiðis. Tí ber eisini illa til at fara afturum aftur og bøta um eina týðing, tá hon einaferð er gjørd.

Tað er eisini ein orsøkin til, at fleiri eldri týðingar eru slopnar við í nýggja savnið *Filomela* við týðingum eftir Alexandur Kristiansen, ið samstundis er tað seinasta av fimm søvnum, sum hann fór undir miðskeiðis í nítiárunum.

Endamálið við søvnunum var frá byrjan, at geva føroyingum møguleikan at lesa yrkingar eftir nakrar av heimsins bestu yrkjarum á okkara egna máli. At yrkingar kanska ikki eru tað, fólk lesa mest av, tykist bara at hava gjørt ætlanina enn meir átrokandi.

– Yrkingar gera okkum ríkari í so nógvar mátar. Tær lova okkum inn í øðrvísi mátar at hugsa, samstundis sum tær ofta vísa, at vit menniskju als ikki eru so ymisk, sum vit kanska billa okkum inn. Tí kann ein 2000 ára gomul yrking eisini vera ein sonn opinbering av størri samanhangum. Um eg fái eg latið hesar yrkingarnar í ein føroyskan málbúna, gevi eg enn fleiri lesararum møguleikan at uppliva tær, og tað ger meg glaðan

> Jóanes Nielsen sigur sovorðið, sum eg vildi ynskt, at eg tordi at siga

Fyri ikki at tala um, hvussu vøkur tey kunnu vera – hansara »yndisbørn«, sum Alexandur Kristiansen kallar sínar týðingar, hóast hann kanska er mest kendur fyri sínar mongu barnarímur og yrkingar.

– Barnarímurnar og yrkingarnar eru eisini míni børn, men týðingarnar eru míni yndisbørn, tí eg havi havt tær hjá mær so leingi og eri vorðin so góður við tær. Eg havi til dømis sitið við eini týðing av John Keats í eini 30 ár og verði kanska ongantíð klárur at sleppa henni.

## Týddi í týskttímunum

Fleiri hundrað týðingar av nøkrum av heimsins bestu yrkingum er tað vorðið til, og í mangar mátar er samlaða verkið ein ferð gjøgnum lívið sum týðari hjá kenda høvundanum úr Fuglafirði, ið longu sum óviti var púra bitin av yrkingum. Serliga vóru tað yrkingarnar í lesibókini í føroyskum, sum hann helt vera so øgiliga vakrar.

– Eg fekk ikki eyguni av flottu rímunum og gomlu orðunum, og tað kitlaði í mær at vita, hvussu yrkjararnir gjørdu, fyri at fáa tað at sita so væl. So eg setti meg at skriva yrkingarnar av í tímunum, tí sum oftast leyp lærarin tær um, minnist Alexandur Kristiansen.

So meðan hini í flokkinum vóru himmalsfegin um at sleppa undan yrkingunum, sat ungi Alexandur og fylti tær inn í eitt skrivihefti fyri og annað eftir.

– Eg man eiga stakkar av hasum skriviheftunum onkustaðni. Í dag kann eg undrast yvir, at eg brúkti so nógva tíð uppá at sita og skriva av, men tað gav mær faktiskt eina góða kenslu av, hvussu yrkjararnir gjørdu.

Ikki minni avbjóðing bleiv tað, tá týskt kom á tímatalvuna í 2. real, og Alexandur fyrstu ferð fór at royna seg sum týðara.

– Eg minnist serliga væl, hvussu spennandi tað var at royna at týða yrkingar hjá týska skaldinum Heinrich Heine. Tá helt eg eisini mínar týðingar vera øgiliga flottar, men í dag høvdu tær ikki sloppið við í nakað av mínum søvnum.

## Betri enn yrkingarnar

Hóast fyrst royndirnar sum týðari nokk mest vóru ein roynd at herma eftir teimum stóru yrkjararnum, eigur man ikki at undirmeta lærdómin í at spæla við teir veruliga dugnaligu, heldur Alexandur Kristiansen.

– Tað ræður um at fáa eina kenslu av málinum, eina kenslu av, hvat tað er, sum hendir, tá ljóð, rytma og innihald ganga upp í eina hægri eind. Ta kensluna fært tú bara við at arbeiða støðugt og áhaldandi við málinum, til tú finnur tín egna stíl og týðingin til endan syngur seg sjálva á føroyskum, næstan sum var hon tín egna, sigur Alexandur Kristiansen, sum tí heldur ikki góðtekur kenda páhaldið hjá yrkjaranum Robert Frost um at »Poesiur er tað, sum verður mist í týðingini«. ▶